Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen

Evni : Vìðkan av barnapsykiatriska dagtilboðnum

Spurningar:

1. Eru nakrar ítøkiligar ætlanir um at víðka barnapsykiatriska dagtilboðið, og um so er, nær ?
2. Hvørjar eru royndirnar við dagdeildini ?
3. Hvussu nógv børn hava fingið viðgerð á dagdeildini ?
4. Hvussu stórur er viðgerðartørvurin, og hvør er tørvurin at víðka um virksemið við kvøld-, náttar- og vikuskiftistænastu?

Viðmerkingar:

Tað var eitt stórt frambrot, tá ið vit fingu eina barnapsykiatriska dagdeild. Frammanundan hevði virksemið í barnapsykiatriini í stóran mun verið útgreining av børnum, og tørvur var á at fáa sett í verk eitt viðgerðandi tilboð við møguleika fyri innlegging.

Dagdeildin hevur nú virkað í eina tíð. Lagt var upp til, at tað skuldi bera til at hava børn innløgd á deildini, um tørvur var á tí. Men virksemið er í høvusheitum í dagtímunum gerandisdagar.

Nú er áhugavert at vita hvussu deildin roynist, hvør tørvurin er, og um ætlanin er at víðka um virksemið við tí fyri eyga, at barnapsykiatriska deildin kann veita hjálp allar dagar í árinum, og alt samdøgrið.

Á Løgtingi, 3. mai 2021

Sirið Stenberg